# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 24.10.2022 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-96-2022: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 147f, 206, 338b og al, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 147f letur umleið 37 m2, matr. nr. 206 letur umleið 57 m2, matr. nr. 338b letur umleið 30 m2 til vegin al og at vegurin al letur umleið 27 m2 til matr. nr. 147f.
   **Avgerð**:
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

2. **102-89-2022: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 178c og 178a, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 178c letur umleið 71 m2 til matr. nr. 178a, sum hinvegin letur umleið 71 m2 til matr. nr. 178c.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan og at geva frávik í mun til byggisamtyktina, soleiðis at umleið 50 m2 av matr. nr. 178a verða broyttir frá øki J: Landbúnaður til B: Sethúsaøki við næstu broyting í byggisamtyktini.

3. **102-98-2022: Umsókn um sundurbýti – matr. nr. 131d, Hvalba.**
   Søkt verður um, at umleið 2.082 m2 verða býttir frá matr. nr. 131d.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

4. **102-78-2022: Skúlabarnaflutningur svimjing og breytir – innkomin tilboð.**
   Innkomin tilboðini uppá skúlabarnaflutning til viðgerðar.
   **Trivnaðarnevndin 20.10.2022:**
   Nevndin mælir til at taka av lægra tilboðnum kr. 280.000,00 v/MVG.

**Fíggjarnevndin 24.10.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum kr. 280.000,00 v/MVG.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **102-103-2022: Skriv frá Tvøroyrar Kommunu um arbeiðsbólk.**
Áheitan frá Tvøroyrar Kommunu, ið hevur heimilað borgarstjóranum, Kristin Michelsen at taka stig til, at allar kommunurnar í oynni velja hvør sín lim í arbeiðsbólk, sum skal viðgera uppskot um kommunusamanlegging í Suðuroynni.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við at seta ein arbeiðsbólk at kanna fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging.

6. **102-64-2022: Umsókn um framhaldandi stuðul til barnagarðsstovu.**
Søkt verður um, at uppnormering/stuðul 30-35 tímar til barn á barnagarðsstovu heldur fram til 01.07.2023.
**Trivnaðarnevndin 20.10.2022:**
Nevndin mælir til játta umbidnu uppnormering.
**Fíggjarnevndin 24.10.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta 30 tímar um vikuna til uppnormering/stuðul.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

7. **102-105-2022: Fíggjarætlan 2023 – 1. viðgerð.**
Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 33.297.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 9.271.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.450.000,00.
Inntøkurnar eru mettar til kr. 33.371.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 9.271.000,00 sambært meting frá FMR.
**Fíggjarnevndin 24.10.2022:**
Nevndin mælir til, at skattaprosentið verður broytt til 20,6% og barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 6.500,00.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

8. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.40

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Martin í Nesi